**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Túrur nr. 1946 Brislingakanning, tíðarskeið 6-9/11 2019**

**Fólk frá HAV:** Jan Arge Jacobsen og Eydna í Homrum
**Onnur fólk**: Hilmar Johannesen

**Ábyrgd:** Jan Arge Jacobsen

**Endamál:** Undankanning til at menna mannagongd at kanna føroyska brislingastovnin.

**Reiðskapur:** Yngultrol.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini 06. november kl. 10. Fyrsta dagin bleiv Tangafjørður kannaður og trolað varð tríggjar ferðir. Annan dagin vórðu Hvannasund og Haraldssund norðan fyri brúnna kannað; hetta kvøldið varð siglt inn á Borðoyavík, Lambavík og Rituvík. Triðja dagin varð Skálafjørðurin kannaður saman við Vikmar (Vikmar Explorer), sum royndi aðra akustiska útgerð (SeaPix) – hetta fyri at samanbera hættirnar. Fjórða og seinasta dagin varð siglt inn á Sørvágsfjørð og gjøgnum Vestmannasund.

Sum heild gekst túrurin væl. Trolað varð seks ferðir, og brislingur var í hvørja ferð, tó bert ein einstakur í seinasta hálinum á Skálafjørðinum.

**Fyribils úrslit:**
Sum heild kann sigast, at brislingur er inni á fleiri av føroysku firðunum. Um dagin er skriftin í erva nakað spjadd, meðan hon niður móti botni er savnað meira í torvur. Í myrkri, tá brislingurin fer upp frá botni, er skriftin meira spjadd yvir stórar partar av vatnsúluni. Mest sannlíkt er spjadda skriftin í erva heilt ungur brislingur (0 ár), meðan skriftin longri niðri er størri brislingur (1 ár). Brislingurin hevði ikki savnað seg enn, sum hann er vanur at gera vetrarmánaðarnar, sambært heimildarmanninum Hilmari Johannesen. Mynd 1 vísir ekkóskriftina, sum var mett at vera brislingur.

Nakað av skrift var at síggja á Tangafirði og norður móti Oyri. Trý hál vórðu gjørd í Tangafirði. Eitt í vatnskorpuni og tvey heldur djypri. Mest varð fingið av heilt smáum brislingi (minni enn 6 cm), men tey bæði seinnu hálini var eisini eitt sindur av størri brislingi uppií. Í Hvannasundi og Haraldssundi varð skrift, tá komið var nakað suður í sundini; í Hvannasundi var talan um stóran brisling, meðan heldur smærri brislingur varð fingin í Haraldssundi. Á Borðoyavík og Lambavík varð "brislinga-skrift", men tá var ov myrkt til at trola. Á Rituvík var ikki nevnivert av "brislinga-skrift". Á Skálafjørðinum varð eitt sindur av skrift – serliga við botn í djypsta økinum; trolað varð eisini á Skálafjørðinum, men tað hálið miseydnaðist – einans tríggir toskar og ein brislingur fingust, tó hevði eini toskurin etið tveir brislingar. Á Sørvágsfirði sást eisini eitt sindur av "brislinga-skrift", men líkindi vóru ikki at trola.

Longdarbýtið av brislinginum sæst á mynd 2. Mest varð fingið av smáum brislingi – tó hevur longdarbýti tveir skildar toppar. Aldursbýtið vísir, at bert 0 og 1 ára gamal brislingur vórðu fingnir í hesum kanningunum.

**Prøvatøka:** Á túrinum vóru 6 tóv tilsamans. Trolsýnini verða tikin fyri at greina sundur ekkóskriftina undir kanningunum og fyri at kanna støddarbýtið av fiskinum.

**Nær sýnini verða liðugt viðgjørd:** Sýnini vórðu arbeidd í landi, og aldursgreinað tilfar er nú tøkt.

Havstovan
hin 19. december 2019

Jan Arge Jacobsen og Eydna í Homrum




**Mynd 1**. Kanningarøkið hjá *Magnusi Heinasyni* á brislingakanningum í november 2018. Ekkóskriftin, sum var mett at vera brislingur, er víst við violettum bollum. Tilsamans vóru 6 trolstøðir tiknar.




**Mynd 2**. Longdar- og aldursbýti av brislingi á túri 1946. Tveir toppar síggjast á longdarbýtinum; minni toppurin er 0 ára gamal og størri toppurin er 1 ára gamal brislingur.